VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðiingi, um kvøldið nakað minni vindur. Stundum regn og hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av eystri og landnyrðingi, týskvøldið nakað minni vindur. Ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

Hervør vann farteldunа

Hervør Isaksen gjørdist hepni sudoku vinnarin í september mánað. Henni dámar væl sudoku, og hon sigur seg senda inn til sosialin hvønn mánað.

SUDOKU

Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Hervør Isaksen vann sudoku kappingina hjá sosialinum í september og fekk harvið eina farteldu frá Formula.fo. - Mær dámar væl at spæla bridge, so eg plagi at sita á netinum og spæla, tá eg havi tíð til tess, sigur hepni Sudoku vinnarin.

Hvønn mánað skipar sosialurin fyri eini sudoku kapping, har vinnarin fær ein góðan vinning. Henda mánaðin var vinningurin ein fartelda frá Formula.fo, og nógv fólk høvdu sent sínar loysnir inn fyri at hava ein møguleika at vinna farteldunа.

Hepni vinnarin henda mánaðin var Hervør Isaksen, sum býr í Havnini. Hervør er 61 ár og hevur í nógv ár starvast sum lærarinna. Farteldan frá Formula.fo kom sera væl við, sigur Hervør.

- Ja, hetta var sera stuttligt. Eg hevði eina vanliga teldu áðrenn, men ein farteldu er nógv lættari at hava við at gera.

Plagar at senda inn

Hervør sigur, at henni dámar væl at loysa sudoku, og tí plagar hon at senda inn til sosialin hvønn mánað.

- Mær dámar væl at loysa sudoku. Eg plagi at senda allar mínar loysnir inn til sosialin í senn. Tað er einaferð komið fyri, at eg havi funnið tvær loysnir til eina sudoku, og hetta er rættiliga sjáldsamt.

At enda spurdu vit hepna vinnaran, hvat hon ætlar at nýta nýggju farteldunа frá Formula til.

- Eg siti nógv heima og ansi eftir mammu míni, so tá er góður møguleiki at sita frammanfyri telduna av og á. Mær dámar væl at spæla bridge, so eg plagi at sita á netinum og spæla, tá eg havi tíð til tess., sigur Hervør at enda.

Nú er enn ein heppin vinnari funnin í sudoku kappingini, og í oktober hava fólk aftur møguleika at vinna góðan vinning frá sosialinum. Hesaferð er vinningurin ein Amitech 32" flatskermur frá LM-handlinum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	2
Qaqortoq	--
Ammassalik	0
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	8
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	10
Lerwick	12
Aberdeen	16
London	17
Tromsø	--
Bergen	12
Oslo	--
Stokkhólm	15
Keypmannah.	16
Helsinki	11
Moskva	11
Berlin	16
Warzawa	15
Kiev	10
Bukarest	15
Paris	17
Madrid	25
Róm	24
Malorca	25
Athen	--
Malta	23
Tunis	25
Beijing	17
New Dehli	33
Bangkok	30
Jakarta	33
Sydney	15
New York	20
Miami	30
Los Angeles	20
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	--
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1031 hPa. við Jan Mayen fer eystureftir og viknar. Eitt lágtrýst, 976 hPa. sunnan fyri Írland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.



Í dag:
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga suðureftir og brúgvalagið til Føroya stendur mestsum í stað, men fer væntandi suðureftir leygardagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 17/10 kl. 06^{00}– 18/10. 06^{00}. Hitin í gjár: 5,9° Minsti hiti máldur í oktober: - -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. 06^{00}– 18/10 kl. 06^{00} Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

GEVID BLÓÐ

VESTFALLSKYRRINDI

14. oktober Seinna kvarter
19. oktober Mánin longst frá jørðini
22. oktober Tendring

Kelda: Ámanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
19. Okt	05.33	17.52	04.33	16.52	04.48	17.07	07.33	19.52	08.33	20.52	03.48	16.07	02.48	15.07	05.48	18.07	06.48	19.07	05.18	17.37	06.33	18.52
20. Okt	06.08	18.25	05.08	17.25	05.23	17.40	08.08	20.25	09.08	21.25	04.23	16.40	03.23	15.40	06.23	18.40	07.23	19.40	05.53	18.10	07.08	19.25
21. Okt	06.42	19.00	05.42	18.00	05.57	18.15	08.42	21.00	09.42	22.00	04.57	17.15	03.57	16.15	06.57	19.15	07.57	20.15	06.27	18.45	07.42	20.00
22. Okt	07.19	19.38	06.19	18.38	06.34	18.53	09.19	21.38	10.19	22.38	05.34	17.53	04.34	16.53	07.34	19.53	08.34	20.53	07.04	19.23	08.19	20.38
23. Okt	07.57	20.16	06.57	19.16	07.12	19.31	09.57	22.16	10.57	23.16	06.12	18.31	05.12	17.31	08.12	20.31	09.12	21.31	07.42	20.01	08.57	21.16

5 707265 100050 >